# Ð AT FARA STÝRINUM

## Tað skal eitt stórt arbeiði til innanfloks í Javnaðarflokkinum

stýriskvinann sigur, at við tí fíggjarkarmi, sum skúlaverkið fær í 2011, verður tað eitt krav frá henni, at bygnaðarbroytingarnar í fólkaskúlanum verða gjøgnumførdar frá næsta skúlaárið at rokna, altso á sumri í 2011.

Endamálið við bygnaðarbroytingunum skal vera at leggja skúlar saman fyri at kunna gagnnýta játtanina nógv betri.

Hon sigur, at verða bygnaðarbroytingarnar ikki settar í verk, ber ikki til at hava tann fólkaskúla, hon vil leggja navn til og so verður neyðugt at finna annað landsstýrisfólk í mentamálum at umsita skúlaverkið.

**Sama krónutal**

Hon sigur, at í 2011 er ætlanin at fólkaskúlin skal hava somu játtan, sum í 2010.

– Tí verður avgerðandi neyðugt at broyta skúlabygnaðin fyri at fáa pengarnar at røkka til soleiðis at vit kunnu varðveita ein skúla á einum støði, eg vil leggja navn til.

### Vit mugu finna útav, hvørjum vit vilja samstarva við restina av valskeiðnum

Hon sigur, at tey hava longu spart tað, sum hon heldur at tað ber til at spara og tí skulu antin fleiri pengar til, ella ein umfatandi bygnaðarbroytingar til fyri at varðveita ein skúla á norðurlendskum støði.

Ein trupulleiki, sum ikki ger hetta lættari, er, at spurningurin um bygnaðarbroytingar í fólkaskúlanum og broytingarnar í kommunubygnaðinum eru tengdar saman.

Tí ber ikki til at nýskipa skúlan, fyrenn semja eisini fæst í samgonguni um at nýskipa kommununala bygnaðin við tí endamáli at leggja allar Føroyar saman í sjey kommunur.

Tað er ikki semja í samgonguni um at nýskipa skúlan, men tað er enn minni semja um at nýskipa kommunubygnaðin, so Helena Dam á Neystabø ásannar, at uppgávan verður torfør.

*aki@sosialurin.fo*



# Upp í 20 milliónir

**Helena Dam á Neystabø hevur ikki fulla greiði á, hvussu nógvur pengingur skal finnast fyri at fólkaskúlin skal hava nøktandi karmar.**

**Men hon sigur, at talan er um fleiri milliónir, kanska eina tveysiffraða milliónaupphædd.**

**Ein vanlig framskriving er ímillum fimm og 20 milliónir, men tað veldst eisini um, antin almennu lønirnar hækka og um hvussu nógv, vit vilja menna skúlan.**

**Annars er játtanin til fólkaskúlan hækka, men afturfyri er virksemi nógv økt, sum ein avleiðing av pisakanningum, eftirútbúgvingum og øðrum raðfestingum.**

**- Men so blivu sparingar settar í verk og avleiðingin av tí var, at vit máttu taka 1000 burtur úr skúlanum um vikuna frá 1. august í ár.**

**– Tað kann ikki halda fram og tí mugu bygnaðarbroytingar til, staðfestir landsstýriskvinnan.**

# Langt frá eini semju

Tað er ein stórur spurningur um tað yvirhøvur fer at eydnast samgonguni at semjast um nakrar av teimum bygnaðarbroytingunum, sum talan hevur verið um á fiskivinnuøkinum, kommunuøkinum í skúlaverkinum og á eldraøkinum.

Flokkarnir í samgonguni eru ikki samdir um, antin hesar bygnaðarbroytingarnar skulu fremjast ella ikki.

Men tað er eisini ósemja innanfloks í teimum ymsu flokkunum, eitt nú eru bæði Javnaðarflokkurin og Fólkafloksflokkurin spjaddir í spurninginum um ymsar nýskipanir, eitt nú á skúlaøkinum og á kommunuøkinum.

Fleiri politikarar í samgonguni vilja ikki leggja skúlar saman og tað er eisini stór ósemja um, antin kommunur skulu leggjast saman við lóg, ella um vit skulu bíða eftir eini sjálvbodnari samanlegging.

Men tað er somuleiðis ósemja um, hvørji málsøki skulu leggjast undir kommunurnar. Javnaðarflokkurin er ikki heitur fyri at leggja skúlan undir kommunurnar, men tað er stemningur fyri í samgonguni annars.

Tað eru eisini partar í samgonguni, sum krevja, at bygnaðurin í kommunuøkinum skal ikki broytast fyrrenn avtala eisini er fingin um, hvørji málsøki tær nýggju, stóru kommunurnar skulu fáa at umsita - og tey bæði málini skulu fylgjast at

Samstundis hevur Fólkaflokkurin altíð verið ímóti ætlaðu bygnaðarbroytingunum á fiskivinnuøkinum við tilfeingisgjaldi og fiskidagabanka.

## Vit eru ósamd

Helena Dam á Neystabø staðfestir, at tað vísir seg at vera sera torført at fáa undirtøku fyri teimum bygnaðarbroytingum, hon heldur, skulu til fyri at framtíðartryggja vælferðarsamfelagið og búskapin.

Hon hugsar um nógv umrøddu bygnaðarbroytingarnar á fiskivinnuøkinum, kommunuøkinum og ikki minst, á skúlaøkinum, sum hon sjálv umsitur í landsstýrinum.

– Men veruleikin er, at heldur ikki innanfloks í Javnaðarflokkinum er semja um hesar nýskipanirnar, sigur landsstýriskvinnan.

Hon sigur, at tað krevst eitt stórt arbeiði innanfloks í Javnaðarflokkinum at gera virðisgrundarlagið hjá flokkinum upp og so at fáa greiði á, hvørjum øðrum flokkum, vit kunnu røkka teimum málunum saman við.

– Vit mugu koma burtur úr hesi naggatódnini, sum hevur havt lyndi til at bíta seg fasta. Hvørja ferð, vit koma í fíggjarliga trupulleikar, vísir tað seg, at vit hava bara eitt amboð og tað er at fara runt við sláimaskinuni, tí nýskipanirnar og bygnaðarbroytingar taka ov langa tíð at gjøgnumføra.

– Og tá kunnu vit koma at gera okkum inn á okkara hjartamál.

– Tí mugu vit fáa ferð á bygnaðarbroytingarnar, so at vit fáa eitt langtíðarperspektiv inn í politikkin, sigur Helena Dam á Neystabø.